

*Deild 2*

*Modellmynd: Jens Kristian Vang*

Óli er gamal í Eirargarði. Hann noyðist inn á skrivstovuna eftir eldi, hvørja ferð hann fer at festa sær í.

Eyðun situr hond upp undir høku, og nýbyrjaða Jóhanna lenar seg forvitin inn yvir borðið, tá ið Óluva kunnar um Anniku Winther, sum er miðskeiðis í fjørutinum.

– Hon gongur bara og grínur og tosar okkurt, sum líkist fronskum, sigur Óluva. Annika er skizofren, tung í huga, sosialt illa fyri og undirsvøvnt.

Kári drepur ein mola niður í guvandi kaffikrússið og sutlar sundurblotnaða sukurið í seg. So fer hann á føtur at geva Jens Martini stovu 4 hjá fyrrverandi amerikanska forsetanum. Fínasta svitan á Hotell Føroyum eitur nú Clinton-svitan. Kanska stova 4 á stongdu deild fer at eita tað sama.

Óluva bítur í brillustellið og blaðar í seinastu mappuni, sum er um 30 ára gamla Kristian Poulsen, ið aftur er innlagdur. Kristian hevur tikið Lamictal, sum heldur hýrinum toluliga støðugum, men hóast ávaringar hevur hann kvett viðgerðina av. Nú er spurningurin, nær ið alt Lamictalið er farið úr kroppinum, og ein sálarkreppa rakar.

## Eingin tolir alt

Úti í gongini gongur ein maður miðleyst og válar við eini appilsin í hondini. Aftur og fram við teimum 20 bláu hurðunum upp í saman. Tað er Hans. Tá ið hann sær blaðmannin, fær hann hug at práta um sítt tunglyndi, ið hann heldur vera elvt av útlúgving. Hans hevur gjørt eitt rættiliga umfatandi diagnostiskt arbeiði; bæði áðrenn hann læt seg leggja inn í samráði við konuna, og síðan hann kom á deildina fyri góðum trimum vikum síðan. Á heimasíðum hjá sálarviðgerum, netlæknum og óttasamtøkum hevur hann funnið einar 100 síður um sjúkuna. Nú situr hann og blaðar í sínum tunga savni um tunglyndi. Hans greiðir frá, at hann fegin vil skilja sína støðu. Hví hann er útbrendur, svartskygdur og vónleysur. Hví ræðsla og ranghugsan tóku hann av ræði. Hví sjálvmorðshugsanir stundum hava verið uppi og vent. Og um tað man vera áhaldandi strongd, ið er øll orsøkin. Hann tosar opið um hetta og blaðar gjøgnum ørkini, sum hann hevur strikað okkurt undir á, meðan Marin gongur rundanum og ringir seg saman sum ein køttur. Hans kveitir at henni og hyggur síðan beint inn í eyguni á blaðmanninum.

– Eg vil sleppa út av tí, sigur hann.

Fyribils fær hann heilvág fyri tunglyndi, ótta og paranoia.

Tað, sum er ringast, heldur Hans kortini vera karmarnar á deild 2.

– Starvsfólkini eru fantastisk, men alt annað er út av lagi. Her er ov vánaligt netsamband og bara tvey sjónvørp. Men her er nokk av bureaukratii; tey skulu ígjøgnum eina heila pappírsmyllu bara fyri at fáa ein pískara til køkin! Og tey fáa ikki nógv meiri í løn enn einar 14.000 krónur um mánaðin, sigur hann.

Marin loypur upp úr stovustólinum beint við okkum og fer uttar í gongina og innar í kamari. Og Hans hugleiðir opinskáraður víðari:

– Eg haldi, at vit menn eru serliga seinir í vendingini, tá ið vit verða sálarliga sjúkir.

Vit gera eina roynd at fara innar á kamarið hjá Hansi. Men vit mugu taka okkum aftur. Hans hevur nevniliga ikki kamar einsamallur. John Dahl liggur og svevur har inni. Stutt eftir er John Dahl á fótum. Vit vaktu hann av óvart. John Dahl kemur út, so vit sleppa inn.

Kamarið er einar 16 fermetrar til støddar og hvítt og dapurt í einum. Hetta er reiðrið hjá tveimum fremmandum monnum, ið eru raktir av sinnissjúku. Teir skulu sova saman næstan sum hjún. Har er einki vesi og sera avmarkað skápspláss. Hans setur seg niður á seinginia og suffar:

– Huff! Eingin tolir alt. Strongdin rakti meg sálarliga. Onnur fáa hjartatrupulleikar ella heilabløðing ...

Hann fer á føtur aftur og yvir at vindeyganum, haðan tað sæst niður í ósligna urtagarðin. Maðurin er sligin í herðunum. Tykist søkklaðin av sorg.

– Eg sakni náttúruna ...

## Pilla av, Finnur!

Heldur tú, at øll hoyra tað, tú tosar um, ert ikki neyðturviliga paranoidur. Tí á deild 2 gellir at kalla hvørt orð gjøgnum vánaligar veggir, avoldaðar luftskipanir og bert betong.

Tey flestu á deildini hoyra Kára mæla blaðmanninum til at gloyma alt um geykareiðrið, hóast vaktirnir her inni altíð eru árvaknir. Og so tosar hann um, at tá ið vandi er á ferð, verður enn sum áður okkurt skjóttsissandi evni sproytað beinleiðis inn í vøddavevnaðin á sjúklingunum.

– Men vit royna av øllum alvi at sleppa undan at nýta vald. Tað skal gerast so varliga sum gjørligt, leggur hann dent á, meðan Kristian stendur burturifrá við útspílaðum oyrum.

At eygleiða skurvblandingin á sálardeildini her, er sum at vera til seinasta dans í VB-húsinum. Øll ættarlið og sinnisløg eru umboðað. Óli K. fer glaður gleivandi eftir gongini. Kristian stendur hendur í lumma. Jóhanna situr við krosskastaðum ørmum. Og øll lýða á, tá ið Kári greiðir speisamt frá um raðfestingar. Hvør stórt er tað ikki, hugsar blaðmaðurin, tá ið hesin setningurin glíður úr Kára:

– Deild tvey er faktisk partvís nútíðmansgjørd. Tað var í 1988 ...

Eisini John Dahl stendur hendur í lumma. Hann er dølskur á at lýta. Kári spyr hann, um tað var tungt at hava familjuvitjan fyrr um dagin. John Dahl svarar fátónað, at hann var glaður at síggja børnini. Og so gníggjar hann eyguni. Dølsknið dylist ikki. Har vóru eingi tár í eygnakrókunum. Bara svøvnur.

Elsa suffar. Hon er enn ill og